UTTAN ÚR HEIMI

## Ivast í Blair

Tað tykist vera líka mikið, hvat bretski forsætisráðharrin ger fyri at tekkjast veljarunum, tí bretar hava snøgt sagt ikki álit á honum longur, eru meiningakanningarnar eftirfarandi.

Fyri nøkrum døgum síðani kunngjørdi Blair, at stjórnin fer at nýta nógvar pengar til at nútímansgera heilsuverkið, skúlaverkið og ta almennu samferðsluna, samstundis sum størri dentur skal leggjast á bardagan ímóti tí veksandi kriminalitetinum. Men nú vísir ein kanning, at heili 63 prosent av fólkinum vænta sær ongan bata burtur úr teimum fráboðaðu tiltøkunum.

Tað er ikki bara á tí innanríkispolitiska pallinum, at Blair hevur trupulleikar við undirtøkuni. Bara 22 prosent siga seg hava álit á tí, sum forsætisráðharrin sigur um bretska uttanríkispolitikkin.

## Fer sjálvur at skriva

Shah Mohammad Rais, sum gjørdist kendur um allan heim sum høvuðspersónur í bókini "Bókahandilsmaðurin í Kabul" hjá norsku tíðindakvinnuni Åsne Sejerstad, ætlar sær nú at skriva sína egnu bók.

Shah Mohammad Rais er sera misnøgdur við tað, sum stendur í bókini hjá norsku tíðindakvinnuni, tí hann heldur, at hon fer alt ov nær dagliga lívinum hjá bókahandilsmanninum og húski hansara. Hann sigur, at hann fer at skriva sína egnu bók, og at hann tá fer at lýsa tað, sum Åsne Sejerstad fekst við, meðan hon var í Kabul. Hvat hann fer at skriva, vil hann ikki siga.

"Bókahandilsmaðurin í Kabul" er týdd til seytjan mál og er komin út í fleiri londum. Í gjár kom hon út í USA, sjálvt um høvuðspersónurin hevði kravt, at amerikanska útgávan varð steðgað.

## Kann enda í fongsli

Tann 62 ára gamli fyrrverandi amerikanski skúlalærarin Faith Fippinger fór til Bagdad at virka sum livandi skjøldur, tá amerikanararnir hóttu við at leypa á Irak. Nú kann hon fáa stóra bót og fongsulsrevsing.

Faith Fippinger var í Irak í tríggjar mánaðir. Umframt at virka sum livandi skjøldur arbeiddi hon sum lærari í fleiri skúlum og á einum sjúkrahúsi. Tá amerikanararnir gjørdu álvara av ætlan síni og lupu á Irak, rýmdi hon haðani og fór aftur til Florida, har hon býr. Men tá var sambært amerikonsku myndugleikunum ov seint. Teir hava nú skuldsett hana fyri at hava brotið amerikonsku revsitiltøkini ímóti Irak, og fyri tað kann hon fáa næstan sjey milliónir krónur í bót og upp til tólv ára fongsul.

Fyrrverandi lærarin, sum hevur tikið lut í fleiri friðartiltøkum fyrr, vísir skuldsetingunum aftur. Hon sigur, at tað, sum hon gjørdi, var ein partur av hennara demokratisku rættindum. Vit hava ymsikar áskoðanir, og vit hava loyvi at vísa tað, sigur hon.

## Drekka minni mjólk

Tað er ikki bara í Føroyum, at tosað verður um, at skúlabørn drekka minni mjólk enn fyrr.

Soleiðis er eisini í Noregi. Har vísir ein kanning, at í 1997 drukku 79 av teimum norsku skíulabørnunum mjólk fleiri ferðir um dagin, men í dag eru tað bara 45 prosent av skúlabørnunum, sum gera tað. 34 prosent av børnunum siga, at tey drekka ongantíð mjólk, áðrenn tey fara í skúla. 22 prosent siga, at teimum dámar ikki mjólk. Tað søgdu 13 prosent fyri seks árum síðani.

Tað eru ikki bara børnini, sum drekka minni mjólk nú enn fyrr. Støðan hjá foreldrunum er tann sama. Í kanningini í 1997 søgdu 54 prosent av foreldrunum, at tey drukku mjólk meiri enn einaferð um dagin. Nú eru tað bara 26 prosent av foreldrunum, sum fáa sær mjólk meiri enn einaferð um dagin.

# Hann kann koyra Bush úr Hvítu Húsunum

*58 ára gamli Wesley Clark kann gerast ein hóttan fyri George W. Bush á forsetavalinum næsta ár*



**Fyrrverandi generalurin Wesley Clark er tað av teimum demokratisku evnunum, sum tykist hava besta møguleikan at vinna á George W. Bush.**

UPPSTILLING
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Hevur tú verið generalur í amerikanska herinum, kann tað væl loysa seg at stilla upp til forseta. Av teimum 43 forsetunum, sum USA hevur havt, vóru ellivu fyrrverandi generalar.

Nú ætlar ein afturat at royna. Tað er Wesley Clark, sum ætlar at royna at gerast valevni hjá demokratunum til forsetavalið næsta heyst. Hann hevur arbeitt í herinum í 34 ár og varð særdur fýra ferðir í Vietnam-kríggnum. Tað telur í USA.

Wesley Clark boðaði frá avgerð síni í síðstu viku, og longu nú vísa meiningakanningar, at hann er tann, sum hevur besta møguleikan at koyra Bush úr Hvítu Húsunum. Tann seinasta kanningin sigur, at fáa amerikanararnir møguleikan at velja ímillum Bush og Clark, ætla 47 prosent at kvøða fyri Bush og 43 prosent fyri Clark. Hann er tí tað demokratiska valevnið, sum hevur besta møguleikan at vinna á sitandi forsetanum.

Men eitt annað spennandi úrslit er eftir, sjálvt um tað ikki tykist serliga hugsandi í løtuni. Kanningar í USA vísa, at nógvir demokratar vilja hava Hillary Clinton ella Al Gore at stilla upp fyri demokratarnar, sjálvt um bæði hava boðað frá, at tey fara ikki at stilla upp.

# Muturgølan í Statoil ikki liðug enn

**Í næstsíðstu viku noyddist stjórin á uttanlandsdeildini hjá almenna norska oljufelagnum úr starvinum, og í gjár segði nevndarformaðurin seg frá.**

MUTUR
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Tað prutlar undir lokinum í almenna norska oljufelagnum Statoil.

Í næstsíðstu viku reyk stjórin á uttanlandsdeildini hjá felagnum, eftir at tað varð avdúkað, at felagið hevði havt sera ivingasamt samskifti við Iran, og sunnukvøldið varð so kunngjørt, at nevndarformaðurin, Leif Terje Løddesøl, hevði sagt formansstarvið og nevndarsessin frá sær.

Aðalstjórin, Olav Fjell, kann heldur ikki kenna seg tryggan. Hann varðveitti starvið eftir ein sjáldsama drúgvan nevndarfund í síðstu viku, men í gjár kravdi nevndarumboðið hjá starvsfólkunum, at nevndin skuldi halda nýggjan fund, tí umboðið metti ikki, at alt var komið fram á tí fyrra fundinum.

Upprunin til rokið, sum hevur skakað Statoil, er ein avtala, sum leiðslan gjørdi við bretsku ráðgevingarfyritøkuna Horton Investments Ltd. fyri einum ári síðani. Eftir avtaluni, sum var galdandi í tíggju ár, og sum kostaði Statoil 115 milliónir krónur, skuldi Statoil fáa góð ráð um, hvussu felagið kundi sleppa inn á iranska oljumarknaðin.

Men herfyri varð avdúkað, at ein av ráðgevunum hjá bretska felagnum er sonur fyrrverandi iranska forsetan Akbar Hashemi Rafsanjani, og tá kom illgruni um, at mutur mundi vera uppi í málinum. Blaðið Dagens Næringsliv tók málið upp, og tann serliga fíggjarløgreglan fór at kanna málið. Eitt nú er aðalstjórin, Olav Fjell, avhoyrdur sum vitni. Eitt nú er komið fram, at Statoil hevur goldið pengar inn á eina konto í Sveits, og at kontoeigarin er eitt felag á einari oyggj í Karibiska Havinum. Norskir fjølmiðlar skriva, at sessurin hjá aðalstjóranum er sera heitur í løtuni.

# ítróttur

Nr. 179 • týsdagur • 23. september 2003 • 77. árgangur • www.sosialurin.fo

# Fuglfirðingar trúgva upp á tað



*Fuglfirðingar eiga nú aftur lið í bestu deildini. Hetta varð staðfest á heimavølli leygardagin*

**Formaðurin heldur, at ÍF eigur at hava góðar fyritreytir at vera við í kappingini millum tey bestu**

ÍF UPPFLYTING
*Jóannes Hansen*

Fagnaðurin í sambandi við uppflytingar veruleikan hevur ikki lagt seg í Fuglafirði, men ábyrgdarpersónarnir eru longu farnir at hugsa um, hvussu nýggja støðan skal taklast og harvið um, hvussu ÍF skal megna at standa seg í bestu deildini.

– Hetta er rættuliga spennandi, og vit halda okkum hava fleiri góðar orsøkir at rokna við, at tað skal ganga, sigur ungi ÍF formaðurin, Rúni Petersen, tá ið vit ynskja honum og felagnum tillukku við uppflytingini.

Hvørjar eru orsøkirnar til, at tað skal ganga betri hesa ferð, enn tað gekk fyri fýra árum síðani?

– Íblásturin í felagnum og á besta liðnum er heilt øðrvísi nú. Tað ikki bara kennist sum um, at hugburðurin er broyttur. Tað sást aftur á avrikunum og úrslitunum.

Hvør er orsøkin til tað?

– Tað riggar væl fyrisitingarliga nú, felagið er hampuliga væl fyri fíggjarliga, og samanspælið millum nevndir, venjarar og spælararnar hevur verið gott.

Heldur Sigfríður Clementsen fram sum venjari?

– Vit hava ikki skrivað sáttmála við hann, men vit eru áhugaðir í, at hann heldur fram, og Sigfríður sjálvur er eisini áhugaður. Vit hava verið fegnir um tað arbeiðið, sum hann hevur lagt í at ala tað sunna og framrættaða og at lúka burtur tað, sum ikki ber rætta vegin. Tað er eisini hugaligt at hava ein venjara, sum í álvara og miðvíst byggir frá botninum av, fær úrslit og trýr upp á, at tað kann gerast uppaftur betur eitt nú við at leggja størri dent á talent menningina. So vit vóna ein av fyrstu døgunum at gera nýggja avtalu við Sigfríð Clementsen.

Vit skilja á góðum keldum í Fuglafirði, at ætlanin er hjá fleiri at leggja stórt arbeiði í at fáa ÍF heilt upp í 1. deild soleiðis at skilja, at tað ikki bara skal verða ein spurningur um at sleppa undan aftasta plássinum.

– Vit hava eins góðar og kanska betri umstøður enn fleiri onnur feløg. Kommunan hevur rindað fyri nýggjan og fínan vøll, og tá ið tað sást aftur, at stórur álvari verður lagdur í miðvíst arbeiði, so er tað hugaligt at síggja, hvussu vinnulívið stuðlar, heldur ÍF formaðurin.

Í fótbóltspráti hava fuglfirðingar ofta harmast um, at tað skal hava gingið so illa hjá teimum at vera við í stóru kappingini í oynni, samstundis sum teir hava víst á, at tað eru so nógvir góðir fótbóltsspælarar úr Fuglafirði í øðrum 1. deildar feløgum. Her verður eitt nú hugsað um Áslak R. Petersen, Høgna Madsen, Bárð á Lakjuni og Bartal Eliasen í GÍ, Magna á Lakjuni í EB/Streymi og Símun Eliasen í HB. Onkrir av hesum eru bundnir at sáttmálum næsta ár og kanska fleiri árum enn so, men í Fuglafirði vóna teir, at tað fer at bera til at fáa spælarar afturat teimum, sum hava verið við til at flyta upp.

– Tað verður neyðugt at fáa styrk. Men vit fara ikki til Eystureuropa at brenna okkum eina ferð afturat, og vit fara ongantíð aftur at gjalda yvir evni fyri at fáa fótbóltsspælarar til okkara felag. ÍF er eitt áhugafelag, og tað skal vera góður og hugaligur felagsskapur, sum fyrst og fremst skal draga fólk henda vegin. Men sjálvandi eru vit greiðir yvir, at tað er neyðugt við pengum og størri upphæddum enn teimum, sum vit higartil hava arbeitt við, sigur Rúni Petersen, formaður í ÍF.

Ítróttarsosialurin ynskir ÍF hjartaliga tillukku við uppflytingini.